# Stríðið um tað góða grasið

Rithøvundur og myndprýðing: Bárður Oskarsson (FO)
Bókadeild Føroyar Lærarafelags, 2012

Tilnevnd Barna- og ungdómsbókmentavirðisløns Norðurlandaráðsins 2016

Søgugongd: Hundarnir og kaninirnar fara at klandrast um tað góða grasið. Kaninirnar vilja hava grasið fyri seg sjálvar og ræða hundarnar burtur. Men uttan hundarnar smakkar grasið ikki so væl longur.

Evni: samstarv, felagsskapur, klandur, djór, náttúra




## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES saman við teimum yngstu

**Hyggið at permuni saman. Hvørji djór halda tit talan vera um? Halda tit, at hesi bæði djórini eru vinir?**

**Kunnu ein hundur og ein kanin vera vinir? Spælið, at tit eru hundar og kaninir og gerið ljóð og rørslur, sum djórini gera. Renn sum kaninin á s. 31 og ver ræðandi sum hundurin á s. 9.**

### TEY YNGRU

**1. Hyggið at permuni. Hvat halda tit, bókin fer at snúgva seg um?**

**2. Kunnu ein hundur og ein kanin vera vinir?**

**3. Í bókini lumpa kaninirnar hundarnar. Halda tit, at kaninirnar eru klókari enn hundarnir?**

**4. Kenna tit aðrar søgur við hundum ella kaninum? Kanska tit vita onkra søgu um tykkara egna kelidjór?**

**5. Hví halda tit, at grasið er betri, tá hundarnir sleppa at kukka á tað?**

### MIÐLINGAR

**1. Hvat snýr bókin seg um?**

**2. Hyggið at tekningini á s. 21. Kaninirnar arbeiða saman við at gera nýggjar tenn. Hvat halda tit um tað hugskotið? Hava tit fleiri hugskot til, hvussu tær kunnu ræða hundarnar?**

**3. Tosið saman um, hvussu djórini eru teknað. Hví er tann eini hundurin gulur og hin lillalittur?**

**4. Brádliga er grasið gult, tað prikar og tað smakkar ikki so væl, sum tað gjørdi fyrr. Hvat er hent?**

**5. Í endanum av bókini deilast hundarnir og kaninirnar um grasið. Øll hava sítt pláss, og kaninirnar hava skilt, at pláss skal vera fyri øllum á grasinum. Hvat halda tit um endan? Duga tit at greiða frá, hvat tað er, sum kaninirnar hava skilt?**

### TEY STØRRU BØRNINI

**1. Hvat hildu tit um bókina? Var nakað, sum var ringt at skilja? Dugir tú at síggja mynstur og líkleikar við aðrar søgur?**

**2. Finnið fimm sagnorð úr bókini, sum lýsa hundarnar og kaninirnar. Eru orð, sum tit undra tykkum yvir?**

**3. Samanberið myndirnar á s. 9 og 29. Tosið saman um, hvat hendir á myndunum?**

**4. Hyggið at myndini á s. 21. Hví halda tit, at hugskotið riggar so væl fyri kaninirnar?**

**5. Søgan snýr seg um, at pláss skal vera fyri okkum øllum. Tosið um vinalag og at býta við onnur.**

**6. Hyggið at myndunum á s. 16 og 17. Skrivið ein tekst ella gerið eina tekning um tað, sum hendir aftaná.**

**LES EISINI:**

*Træið* eftir Bárð Oskarsson
*Klandursskrímsl* eftir Áslaug Jónsdóttir, Kalle Güettler og Rakel Helmsdal

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Samarbete** | **Samarbejde** | **Samarbeid** | **Samstarf** | **Samstarv** | **Suleqatigiinneq** | **Yhteistyö** | **Ovttasbargu** |



**Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við #nordiskabokslukaren!**